# Eldraráðið 2026 – 2028

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 5 |
| Tíð: | 5. mai 2026 kl. 13.00 – 16.00 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Annemi Joensen, forfólk, Leivur Hansen, næstforfólk, Bergljót av Skarði, Jóhan Carl Dam, nevndarlimur, og Marin Rasmussen, nevndarlimur.

**Fundarskrá:**

1. Val av orðstýrara
2. Góðkenning av síðstu fundarfrásøgn
3. Innkomin vitan frá rundferð
4. Frágreiðing til Tórshavnar kommunu
5. Ymiskt
6. Áseta næsta fund og mál at seta á skrá

AD 1 Val av orðstýrara

Annemi Joensen varð vald til orðstýrara.

AD 2 Góðkenning av síðstu fundarfrásøgn

Fundarfrásøgn góðkend.

AD 3 Innkomin vitan frá rundferð

Eldraráðið viðgjørdi frágreiðingarnar, sum eru skrivaðar um tær 12 vitjanirnar, ið Eldraráðið hevur verið á. Eisini blivu trupulleikar umrøddir, sum Eldraráðið er gjørt varugt við.

AD 4 Frágreiðing til Tórshavnar kommunu

Eldraráðið fer at bjóða býráðslimum til fundar og hava eina framløgu og rapport um tey mál, sum Eldraráðið hevur viðmerkingar til. Samandráttur av vitjanum verður gjørdur, og málini verða flokkað við støði í tí eldrapolitikki, sum býráðið hevur samtykt:

- Virkin og sjálvbjargin
- Virðing og sjálvsavgerðarrættur
- Tryggleiki og nærleiki
- Virkisføri og inklusjón
- Demensvinarlig kommuna

Eldraráðið fer síðani at lata býráðslimunum tilmæli.

AD 5 Ymiskt

Eldraráðið fegnast um, at tað verður møguligt partvíst at taka heilsufakliga útbúgving í Tórshavn.

AD 6 Áseta næsta fund og mál at seta á skrá

Næsti fundur verður 2. juni 2026.

Fundur lokin klokkan 16.00

Tórshavn 5. mai

Bergljót av Skarði,
skrivari

**Góðkent:**

| | | |
|---|---|---|
| Annemi L. Joensen | Leivur Hansen | Bergljót av Skarði |
| forfólk | næstforfólk | skrivari |
| Jóhan Carl Dam | Marin Rasmussen | |
| nevndarlimur | nevndarlimur | |